UTTAN ÚR HEIMI

## ES hóttir samstarv

Í síðstu viku segði formaðurin í norska Høgraflokkinum, Erna Solberg, at tað kann koma upp á tal hjá Noregi at søkja um limaskap í ES í 2007.

Tey orðini fullu ikki í góða jørð í Kristiliga Fólkaflokkinum, sum í løtuni situr í stjórn saman við Høgra, og sum er ímóti norskum ES-limaskapi. Formaðurin í tingbólkinum hjá Kristiliga Fólkaflokkinum, Einar Steensnæs, sigur við Aftenposten, at stendur Erna Solberg við tað, sum hon hevur sagt, so er einki grundarlag fyri, at verandi stjórnarsamgonga kann halda fram aftan á næsta stórtingsval, sum verður í heyst.

Einar Steensnæs sigur, at sjálvandi stendur tað øllum flokkum frítt at tosa um ES-limaskap, men tá ein av flokkunum kunnger, nær Noreg skal søkja um limaskap, er støðan ein onnur.

– Kristiligi Fólkaflokkurin fer ikki at skipa eina stjórn í heyst, um grundarlagið verður tikið undan henni um tvey ár, sigur Einar Steenanæs við Aftenposten.

## Ósemja um oyggjar

Japan krevur nú at fáa yvirvaldsrættin á nøkrum smáum oyggjum í Japanska Havinum, men Suðurkorea sigur kortanei.

Ósemjan snýr seg um tær smáu Dokdo-oyggjarnar ella Takeshima-oyggjarnar, sum japanar nevna tær. Oyggjarnar hava verið undir suðurkoreanskum ræði í mong ár, og sjálvt um tær eru óbygdar, hevur suðurkoreanska stjórnin gjørt av at hava eitt løgreglulið á oyggjunum. Men tann 22. februar kunngjørdu japanar, at nú vilja teir hava ræðið á oyggjunum.

Kravið hevur elvt til mótmæli í Suðurkorea. Stjórnin í Seoul sigur, at Suðurkorea hevur søguligan og landafrøðiligan rætt til oyggjarnar, og at tær eisini sambært altjóða lóg eru partur av Suðurkorea. Fyri at vísa japanum, at oyggjarnar eru suðurkoreanskar, ætla myndugleikarnir at lata suðurkoreonsk ferðafólk sleppa at vitja oyggjarnar, skrivar AP.

## Dundurtala

Týski forsetin, Horst Køhler, krevur nú, at landsins politisku flokkar gera okkurt munagott fyri at basa tí stóra arbeiðsloysinum.

Í einari sjáldsama hvassorðaðari røðu fyri landsins fremstu politikarum og vinnulívsleiðarum segði forsetin, at politikararnir kunnu ikki bara hugsa um verndi vakskeið og næsta val, tí Týskland hevur brúk fyri varandi loysnum. Hann segði, at fyribilsloysnir eru ikki nóg mikið, og hann ávaraði eisini tey, sum velja at sita afturá og bíða, til val hevur verið.

– 5,2 milliónir týskarar eru arbeiðsleysir, so tit mugu skilja, at hetta er ikki nøkur veitslurøða, segði Horst Køhler í røðuni fyri politikararunum og vinnulívsleiðarunum. Tann 62 ára gamli forsetin er fyrrverandi stjóri í altjóða gjaldoyragrunninum IMF.

## Bankamaður fekk sekkin

Nevndarformaðurin í einum av teimum størstu bankunum í Kina hevur fingið sekkin, tí myndugleikarnir hava illgruna um, at hann hevur verið uppi í korrupsjón.

Zhang Enzhao gjørdist nevndarformaður í China Constructing Bank ftyri trimum árum síðani, eftir at undanmaður hansara var funnin sekur í sviki. Nú vilja myndugleikarnir vera við, at Zhang eisini hevur svikað.

Eygleiðarar í Beijing siga, at gølan kemur myndugleikunum illa við. Kinesiska stjórnin hevur sett nógvar pengar í landsins bankar fyri at fáa útlendskar íleggjarar at vísa teimum áhuga, og ætlanin var, at China Constructing Bank skuldi skrásetast á virðisbrævamarknaðinum seinni í ár. Ætlanin hjá stjórnini var at fáa einar 25 milliardir krónur burtur úr skrásetingini, men nú er ivasamt, hvussu verður við tí, skrivar AP.

# Minnisvarði til framtíðina

**Umboð fyri nógv lond og fleiri felagsskapir vóru hjástødd, tá tað nýggja Holocaust-savnið í Jerusalem lat upp**

MINNISVARÐI
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Holocaust-savnið ella Yad Vashem, sum tað eitur á hebraiskum, er ætlað at minna heimin á milliónirnar av jødum, sigoynarum, samkyndum og øðrum, sum týska nazistýrið týndi undir seinna heimsbardaga. Men tá savnið lat upp fyrradagin, varð gjørt greitt, at savnið er ikki bara ein minnisvarði yvir tey deyðu.

– Tann týdningarmesta uppgávan hjá savninum er at ávara um, at slíkt skal ikki endurtaka seg. Hetta er ein minnisvarði fyri framtíðina, segði Kofi Annan, ST-aðalskrivari, undir hátíðarhaldinum.

Fleiri leiðandi politikarar vístu á, at hugsjónin aftan fyri Holocaust-savnið er, at upplýsing og skil skulu forða fyri, at tað, sum hendi undir seinna heimsbardaga, kann endurtaka seg.



*Ísraelski forsetin, Moshe Katzav, og franski forsætisráðharrin, Jean-Pierre Raffarin, hyggja at gomlum myndum úr týsningarleguni Auschwitz*

# Sean Connery upp í politikk

**Skotski tjóðskaparflokkurin hevur fingið tann heimskenda filmsleikaran at hjálpa sær í valstríðnum**

VALSTRÍÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er alment kent, at Sean Connery hevur verið limur í skotska tjóðskaparflokkinum í fleiri ár, og at hann javnan hevur stuðla flokkinum fíggjarliga.

Men nú hevur hann eisini játtað at stuðla flokkinum í tí komandi valstríðnum. Flokkurin hevur fingið gamla 007 at lesa ein telefonboðskap inn á band, og roknað verður við, at minst 250.000 skotskir veljarar fara at lurta eftir teirri sermerktu røddini hjá Sean Connery og boðskapi hansara um, at Skotland eigur at taka loysing frá Onglandi.

Formaðurin í tjóðskaparflokkinum, Alex Salmond, sigur við skotskar fjølmiðlar, at flokkurin er sera fegin um samstarvið við tann heimskenda skotan.

# Hevði 125 loyniligar kontur

**Fyrrverandi einaræðisharrin í Kili, Augusto Piniochet, hevði 125 loyniligar bankakontur í USA**

PENGAR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nýggjar kanningar hava avdúkað, at fyrrverandi kilski einaræðisharrin Augusto Pinochet hevði uppaftur tættari samband við amerikanska bankaheimin enn higartil hildið.

Fyri einum ári síðani kom fram, at Pinochet hevði havt nakrar kontur í amerikanska bankanum Riggs Bank, men nú vísir tað seg, at hann hevði eisini kontur í Bank of America, Espirito Santo Bank í Florida, amerikonskum deildum hjá Banco de Chile og øðrum bankum í USA. Talan var bæði um pengar, partabrøv og virðisbrøv.

Ein amerikonsk senatsnevnd, sum hevur kannað viðurskiftini, sigur í sínari frágreiðing, at summir amerikanskir bankar hjálptu gamla einaræðisharanum at fjala pengar, meðan aðrir skákaðu sær undan amerikanska lógarverkinum á økinum.

Riggs Bank viðgekk í fjør, at Pinochet var viðskiftafólk hjá bankanum í átta ár, men nú er komið fram, at hann var viðskiftafólk hjá bankanum í 25 ár. Bankin hevur fyrr upplýst, at Pinochet hevði níggju kontur í bankanum, men nú vísir tað seg, at tað rætta talið var 28.